Almanna- og mentamálaráðið

Dagfesting:	31. oktober 2023
Mál nr.:	23/21297-13
Málsviðgjørt:	EMH
Ummælistíð:	N/A
Eftirkannað:	30.10.2023

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um familjuískoyti
(Orkuískoyti til húski í 2024, 2025 og 2026)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 160 frá 24. desember 2015 um familjuískoyti, sum broytt við løgtingslóg nr. 167 frá 20. desember 2017, løgtingslóg nr. 187 frá 21. desember 2018, løgtingslóg nr. 65 frá 9. mai 2019, løgtingslóg nr. 18 frá 10. mars 2020, § 10 í løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, løgtingslóg nr. 136 frá 25. oktober 2022 og løgtingslóg nr. 42 frá 29. mars 2023 verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 1 a, stk. 2 verður aftan á "Hjálparískoyti" sett: "og orkuískoyti".

2. Í § 1 a, stk. 3, tvær staðni í § 8 a, stk. 1, § 8 a, stk. 4, sum verður stk. 5 og § 10 a verður "oljuískoyti ella hjálparískoyti" broytt til: "oljuískoyti, hjálparískoyti ella orkuískoyti".

3. Aftan á § 2 d verður sett:

"**§ 2 e.** Orkuískoyti sambært § 1 a er 5.000 kr. og kann útgjaldast eina ferð um árið í árunum 2024 til og við 2026.
Stk. 2. Húski, sum í mesta lagi hevur inntøkugrundarlag á 275.000 kr., kann fáa orkuískoyti."

4. Í § 4 a, stk. 1 og 2 og tvær staðni í stk. 3 verður "oljuískoyti og hjálparískoyti" broytt til: "oljuískoyti, hjálparískoyti og orkuískoyti".

5. Í § 8 a verður aftan á stk. 3 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 4*. Freistin at lata Almannaverkinum umsókn um orkuískoyti er 30. juni á hvørjum ári. Seinasta freist at søkja um orkuískoyti er 30. juni 2026."
Stk. 4 og 5 verða eftir hetta stk. 5 og 6.

6. Í § 8 a, stk. 5, sum verður stk. 6, og § 11 a, stk. 1 og 2 verður “Oljuískoyti og hjálparískoyti” broytt til: “Oljuískoyti, hjálparískoyti og orkuískoyti”.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. februar 2024.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Hetta uppskotið er ein partur av lógarpakkanum um eina skattaumskipan. Endamálið við skattaumskipanini er, umframt at økja um arbeiðsútboðið og at minka um skeikling á arbeiðsmarknaðinum, eisini at eggja til eitt effektivt grønt umskifti av samfelagnum. Tí hækka ávís orkugjøld.

Endamálið við hesum lógaruppskotinum er at tryggja, at húski, sum hava lága skattskylduga inntøku, ikki detta niðurímillum í sambandi við hækkandi orkugjøld, ið umframt at fíggja skattaumskipanina, eisini skulu eggja til grøna orkuskiftið. Hesi fáa tí møguleika at søkja um eitt orkuískoyti galdandi í árunum 2024 til og við 2026.

1.2. Galdandi lóggáva

Løgtingslógin um familjuískoyti fevnir um tríggjar ymiskar veitingar, sum eru ávikavist familjuískoyti, oljuískoyti og hjálparískoyti. Felags fyri allar tríggjar veitingarnar er, at tær verða veittar familjum við lágum inntøkum, sum ikki hava ognir av týdningi.

Familjuískoyti

Familjuískoyti, ið er ein mánaðarlig veiting, hevur verið veitt síðani 2016. Familjuískoyti verður einans veitt familjum, ið hava børn yngri enn 18 ár. Tað eru 250 til 300 familjur, sum hvønn mánað móttaka familjuískoyti. Tey flestu, ið móttaka familjuískoyti, eru stakir uppihaldarar, meðan umleið 15 prosent eru pør.

Upphæddin, sum verður veitt, er treytað av parlagsstøðu, inntøku og tali av børnum. Miðalútgjaldið hevur verið umleið 3.000 kr. um mánaðin, men í sambandi við hjálparpakkan, ið varð samtyktur fyrr í 2023 (løgtingslóg nr. 42 frá 29. mars 2023), er familjuískoytið 750 kr. hægri fyri hvørt barnið um mánaðin í tíðarskeiðnum juni-desember 2023.

Støk, ið hava inntøkugrundarlag lægri enn 290.000 kr. kunnu fáa familjuískoyti. Hjún/samlivandi við einum ella tveimum børnum, sum hava inntøkugrundarlag lægri enn 390.000 kr., og hjún/samlivandi við trimum ella fleiri børnum við inntøkugrundarlagi uppá í mesta lagi 410.000 kr., kunnu fáa familjuískoyti. Tað er tó ein treyt, at umsøkjarar ikki hava ognir meira enn 30.000 kr.

Oljuískoyti

Oljuískoyti varð sett inn í lógina við løgtingslóg nr. 136 frá 25. oktober 2022. Freistin at søkja um oljuískoyti var 30. november 2022, og tað merkir, at húski høvdu nakrar vikur at søkja um oljuískoyti. Endamálið við oljuískoytinum var at veita ein fíggjarligan stuðul til húski við lágum inntøkum í sambandi við ógvusligan prísvøkstur á brenniolju.

Oljuískoyti var ein eingangs upphædd uppá 10.000 kr., ið varð veitt húskjum, ið kundu skjalprógva, at bústaður teirra varð upphitaður við olju. Oljuískoyti var ikki avmarkað til barnafamiljur, og sostatt kundu øll húski – eisini tey, sum ikki hava børn – søkja um oljuískoyti.

Húski við einum vaksnum persóni við inntøkugrundarlag lægri enn 290.000 kr. kundi fáa oljuískoyti. Húski við tveimum ella fleiri vaksnum og við inntøkugrundarlag lægri enn

390.000 kr. ella 410.000 kr. kundu fáa oljuískoyti (um tað var 390.000 kr. ella 410.000 kr. varð treytað av tali av børnum í húskinum).

Hjálparískoyti
Hjálparískoyti varð sett í lógina við løgtingslóg nr. 42 frá 29. mars 2023. Freistin at søkja um hjálparískoyti var 30. juni 2023, og nærum allar umsóknir eru endaliga avgreiddar av Almannaverkinum. Endamálið við hjálparískoytinum er at veita ein fíggjarligan styrk til húski í sambandi við áhaldandi prísvøkstur í samfelagnum. Hjálparískoyti er eins og oljuískoyti ein veiting, ið kann veitast einaferð. Hjálparískoyti er 12.000 kr.

Treytirnar í sambandi við hjálparískoyti eru í stóran mun tær somu sum við oljuískoyti. Høvuðsmunurin er, at oljuískoyti er treytað av, at umsøkjari býr í bústaði, ið er upphitaður við olju. Tað er ikki ein treyt í sambandi við hjálparískoyti. Ein annar munur er, at treytirnar hjá pørum eru eitt sindur lagaligari í sambandi við hjálparískoyti, umframt aðrar smávegis munir.

Felags fyri oljuískoyti og hjálparískoyti er, at inntøka og ogn hjá øllum vaksnum persónum, ið sambært fólkayvirlitinum eru skrásettir at búgva á bústaðnum, verða tikin við. Í sambandi við familjuískoyti er tað inntøka og ogn hjá foreldrum. Um talan er um stakan uppihaldara, er tað inntøka og ogn hjá uppihaldaranum og møguligum samliva.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Lógarpakkin hjá landsstýrinum um skattaumlegging fevnir um broytingar, sum lækka skattin og økja um ymisk gjøld. Ávísar familjur, sum hava lága inntøku, fáa ikki í nóg stóran mun ágóða av skattalættanum, meðan øktu gjøldini fara at raka flestu húski.

Endamálið við hesum lógaruppskotinum er at tryggja, at húski, sum hava lítla skattskylduga inntøku, ikki detta niðurímillum í sambandi við hækkandi orkugjøld, ið umframt at fíggja skattaumskipanina, eisini skulu eggja til effektiva grøna orku umskiftið. Endamálið er at veita húskjum við lágum inntøkum, sum ikki hava ognir av týdningi, ein fíggjarligan stuðul við eini upphædd á 5.000 kr., sum verður útgoldin eina ferð um árið í árunum 2024 til og við 2026. Fyri eisini at eggja til eitt grønt umskifti, verður talan um eina skipan, sum er tíðaravmarkað til trý ár, tá møguleikin fyri at søkja um orkuískoyti fellur burtur.

Skipanin við orkuískoyti verður umsitin á sama hátt sum oljuískoyti og hjálparískoyti. Tað merkir, at veitingin verður veitt eftir umsókn. Tað eru somu meginreglur, sum liggja til grund fyri málsviðgerðini, og t.v.s., at inntøkugrundarlag og ogn verða roknað eftir sama leisti.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Uppskotið hevur við sær, at húski kunnu søkja um eitt orkuískoyti á 5.000 kr., sum verður veitt í árunum 2024 til og við 2026. Húski, ið hava inntøkugrundarlag upp til 275.000 kr. fáa rætt til orkuískoyti. Treytirnar um ogn eru tær somu sum eru galdandi við hjálparískoyti.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur ikki verið til ummælis. Landsstýrið metir tað vera átrokandi, at fíggjarliga sperdar familjur fáa hjálp so skjótt sum gjørligt, og fyri at uppskotið skal verða viðgjørt í hesi tingsetuni, er avgerð tikin um ikki at senda uppskotið til ummælis.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur við sær øktar útreiðslur í fíggjarárunum 2024 til og við 2026. Ein stórur partur av teimum, sum hava fingið hjálparískoyti, fara eisini at fáa ágóða av hesum uppskotinum. Tað vóru umleið 680 húski, sum hava fingið hjálparískoyti upp á 12.000 kr.

Av teimum 680 húskjunum vóru knapt 30 % fólkapensjónistar. Hesi væntast flest øll eisini at fara at fáa rætt til orkuískoyti. Av teimum gott 70 %, ið hava fingið hjálparískoyti, sum ikki eru fólkapensjónistar, fer ein stórur partur eisini at fáa orkuískoyti. Ein týðandi partur av teimum, ið fingu hjálparískoyti, sum ikki eru fólkapensjónistar, eru støk (búgva í húski, ið telur ein vaksnan). Fyri húski, ið telur ein vaksnan, er lítil munur á treytunum millum hjálparískoyti og orkuískoyti. Leysliga mett vera 400 til 500 húski, ið fara at fáa rætt til orkuískoyti og hetta hevur við sær øktar útreiðslur fyri landskassan upp á stívliga 2 mió. kr. í 2024.

Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2024, sum er til viðgerðar í Løgtinginum, er ikki lagt upp fyri hesum útreiðslum, og tí verður neyðugt við einum broytingaruppskoti til fíggjarlógaruppskotið. Tað er heldur ikki lagt upp fyri umsitingarligu avleiðingunum í fíggjarlógaruppskotinum fyri komandi ár av, at Almannaverkið framhaldandi skal veita hesa tænastu.

Uppskotið hevur ikki við sær fíggjarligar avleiðingar fyri kommunur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Umsitingarligu avleiðingarnar av galdandi hjálparískoyti hava verið, at øll fimm starvsfólkini í toyminum, sum umsitur veitingar eftir lógini um familjuískoyti, hava arbeitt við umsóknunum til hjálparískoyti. Hetta hevur havt ávirkan á viðgerðartíðina av øðrum tænastum. Nú tænastan skal halda fram í trý ár, so er neyðugt at tænastan verður styrkt. Lagt er ikki upp fyri hesum í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2024.

Uppskotið hevur ikki við sær umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Ískoytið verður galdandi í árunum 2024 til og við 2026 og kann tí ikki væntast at fáa varandi avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri tey húski, sum fáa rætt til orkuískoyti. Tað væntast at vera ymiskir samfelagsbólkar, sum fara at fáa ágóðan av broytingunum. Láginntøkubólkar eru serliga lesandi, fólka- og fyritíðarpensjonistar, stakir uppihaldarar, ið arbeiða niðursetta tíð o.o.

Men nøkur av hesum eru partur av størri húski, og í tann mun, at onnur í húskinum hava inntøku ella ogn, dettur rætturin til ískoyti burtur.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri skyldur Føroya sambært Hoyvíkssáttmálanum, Evropeiska mannarættindasáttmálanum ella Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar
Lógaruppskotið hevur ikki við sær kendar markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið áleggur ikki heimildir til landsstýrisfólkið, stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar kendar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Ja	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1

Til nr. 1,
Við ásetingini verður heimild givin at veita orkuískoyti til húski, ið annars lúka treytirnar í løgtingslóg um familjuískoyti.

Til nr. 2, 4 og 6
Við hesi ásetingini verður orkuískoyti sett inn alla staðni, har víst verður til bæði oljuískoyti og hjálparískoyti. Endamálið er at tryggja, at orkuískoyti verður umsitið á sama hátt sum oljuískoyti og hjálparískoyti. Tað merkir, at orkuískoyti verður javnsett við oljuískoyti og hjálparískoyti, og at m.a. inntøkugrundarlag og ogn verða roknað eftir sama leisti.

Til nr. 3,
§ 2 e ásetir, at orkuískoyti er ein føst upphædd, ið er 5.000 kr. Orkuískoyti kann bert útgjaldast eina ferð um árið til hvørt húski í árunum 2024, 2025 og 2026. Hvørt húski kann sostatt tilsamans fáa 3 útgjøld á 5.000 kr., um treytirnar eru loknar øll trý árini.

Stk. 2 ásetir, at hægst møguliga inntøkugrundarlag fyri at fáa rætt til orkuískoyti er 275.000 kr. Hetta er uttan mun til, hvussu nógvir persónar búgva í húskinum.

Til nr. 5,
Freistin at lata inn umsókn í tí árinum, har stuðulin verður latin. Freistin at lata inn umsókn er ásett til 30. juni. Tað merkir, at umsóknin skal verða Almannaverkinum í hendi tann 30. juni fyri at verða málsviðgjørd. Umsókn, sum er móttikin aftan á 30. juni verður ikki játtað.

Til § 2
Gildiskomuáseting.

Almanna- og mentamálaráðið, 31. oktober 2023

Sirið Stenberg
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur